
Hugskot og viðmerkingar – *send sms til 225000*

Oddagrein



Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

ÓSEMJAN STØRSTAN TÝDNING

Málið um pensjónsnýskipanina tykist nú umsíðir at vera komið í eina rímuliga trygga legu.

Naggatódn hevur valdað leingi. Í fyrsta lagi var tað samgongan, sum hoknaði og viknaði við tað, at Sonja Jógvansdóttir ikki var partur av loysninin hjá samgonguni. So var tað Kristin Michelsen sum spældi tvørur, tí hann vil hava løgmann at greiða sær fløkjuna á Tvøroyri.

Síðani kom Sjálvstýri upp í semjuna – so nú tyktist glið verða komið á. Men best sum tey hildu væl til standa, so var tað Kári P. Højgaard, sum eisini skuldi sína vøddar – helst orsakað av onkrum stríðið innanfloks í Sjálvstýrinum.

Men tá álitið kom úr trivnaðarnevndini, nú stendur Sonja Jógvansdóttir saman við samgonguni, so nú tykist meirilutin aftur at vera inntaktur.

Men stóru andstøðuflokkarnir, Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin eru ikki við. Teir mæla ikki til nýskipan. Teir eru konservativir og vilja hava pensjónina at vera akkurát sum hon er.

Tað er nú løgið, at okkara lítla høga ting ikki klárar so frægt sum at semjast um nakað so grundleggjandi, sum eina skilagóða pensjónsnýskipan. Lesur tú álitini, so er ilt at fáa eyga á, hvat í veruleikanum skilir partarnar, uttan tað, at tey bara ikki skulu semjast.

Hjá politikarum telur tað øgiliga nógv, at hin parturin ikki fær rós. Tað er eitt tað mest grundleggjandi í politikki. Tað er tí at politiskt orðaskifti ofta er beinleiðis fordummandi. Tú kennir teg býttari aftaná at hava lurtað eftir einum politiskum kjaki. Men tað er ikki tí, at tú sum lurtari ert býttur. Tað er politikkurin, og fólkini, sum fáast við politikk, sum eru soleiðis.

Andstøðan brúkar nógva orku uppá at niðurgera loysnina hjá samgonguni við at stimbra Samhaldsfasta til at gjalda størri part og so at lækka kravda inngjaldið úr 15 prosentum niður í 12 prosent. Tað



er bara ein eyka skattur, siga teir.

Hinvegin so vil adnstøðan aftur hækka skattafríu grundarupphæddina til tað, sum hon var áðrenn hon lækkaði. Argumentatiónin hjá andstøðuni her er samhaldsfesti.

Eyðsæð er, at báðir partar vilja tað sama. Størri samhaldsfesti, størri egingjald, hækka pensjónsaldurin og geva fólki fyrimun, sum sjálvi útseta pensjónsaldurin enn meira.

Men tað sum hevur allar størstan týdning er, at partarnir ikki semjast. Meirilutin skal bara ongan fjøður fáa í hattin. Sikkin ein máti at arbeiða uppá. Hetta hevði ikki gingið á einum privatum arbeiðsplássi.

» Tað er alt um at gera hjá politikarum at dyrka ósemjuna

Minningarorð um Heðin Jacobsen



Ja, í morgun fekk eg boðini um, at Heðin Jacobsen var farin, 62 ára gamal.

Heðin var ættaður úr Skálavík, sonur Ólavur í Geil og Nannu í Hanusarstovu.

Tey síðstu árini hevur Heðin verið merktur av sjúku, men hann hevur ikki góðtikið tað, kundi man síggja á honum, hann arbeiddi álíkavæl, tí arbeiðsevnini hjá Geilamonnunum hava verið framúr.

Heðin giftist til Skopunar við Tórfríð Hentze, saman fingu tey børnini Súsannu, Mads og Herfríð

Sum ungur fór Heðin til skips, sum aðrir ungir menn. Sjálvur dámdi honum væl, var í millum teir fremstu.

Heðin lærdi til skipara, tað var eisini hansara yrki leingi.

Brøðurnir av Kletti, sum var staðarnavnið á barnaheiminum í Skálavík, keyptu sær skip, teir silgdu nakað í byrjanini út frá Skopun, við hesum snotuliga 50-tonsara.

Síðan fóru teir í Eysturssjógvin at fiska.

Tummas, elsti beiggin, og Heðin skiftust um at føra bátin saman við hinum Klettabeiggjunum og væl gekk við fiskaríðinum, jú, hesir brøðurnir rokaðust við Fríðborg.

Men óeydnan var eisini har. Vit minnast at ein dag koppaði báturin og sakk ógvuliga knappuliga. Heðin var skipari og Tummas stýrimaður henda túrin, hinir beiggjarnir, sum vóru við vóru Torbjørn, Ragnar og Hanus, jú, allir fimm beiggjarnir vóru við tá forlisið hendi.

Eg havi sæð í onkrum blað, at teir góðu Harranum Jesus æruna fyri, at teir sloppu við lívinum.

Seinni keyptu teir nýggjan bát, ein 80-tonsara, men tá fór fiskaríið at minka í Eysturssjónum, og seldu teir tann bátin.

Undir arbeiði av troli, fekk Heðin ein trukk oman yvir seg og fekk stóran skaða. Tá hann var komin fyri seg aftur, fór hesin pressari at læra til elektrikkara, og bleiv tað arbeiði hjá honum til sjúkan forðaði hesum.

Jú, tey síðstu tvey árini sá tú henda vakra skálavíkingin vera á keiini í Skopun og arbeiða upp á tíggjumannafarðið Røðina og hegnigur var Heðin, tað liggur til fólkið.

Heðin var ein bekennandi kristin, hann var deknur í Skopunar Kirkju, og læs hann har við síni vøkru rødd, nú er røddin tagnað her á fold.

Eg veit at saknurin er stórur hjá Tórfríð og børnunum og ikki minst abbabørninum, sum so trúliga hann leiddi við sær.

Friður verður við minninum um Heðin á Klett.

Gerhard Lognberg
borgarstjóri



» Bindifestivalur í Fuglafirði

TÍÐINDI SÍÐA 8



» Loysir seg at ganga

TÍÐINDI SÍÐA 9

MC gudstænasta í Meinigheitshúsinum



Við hesum verður kunnað um eina komandi MC-Gudstænastu, sum verður hildin í Meinigheitshúsinum í Havn, leygardagin 21. apríl, klokkan 15.00 stundisliga.

Tað er kristiligi MC-klubburin Cross-Bikers MC Føroyar, ið skipar fyri.

Eins og fleiri undanfarin ár verður í ár ein MC-gudstænasta hildin, har øll MC-áhugað hittast til andaligan felagsskap við sosialari samveru, nú MC-árið 2018 byrjar.

Felagsskoyring við øllum motorsúkklum, verður frá Effo-støðini í Kollafirði, har farið verður klokkan 14:15 stundisliga suðureftir. Komið verður til Havnar umleið klokkan 14:40, har parkerað verður framman fyri Meinigheitshúsið.

Skrá er løgd við bæði felagssangi, sang- og tónleikaluttóku og talu. Tað verður Dan Eliassen frá Meinigheitshúsinum, ið kemur at tala, og tann eftirhondini vælkendi Halleljua Sofus, sum kemur at syngja vælkendar andaligar sangir. Victor Carlsen, sum eisini hevur givið instrumentalar fløgur út, kemur eisini at framføra. Fleiri felagssangir verða eisini á skránni, har endað verður við tjóðsangi okkara: Tú alfagra land mítt.

Eftir gudstænastuna verður kaffihugni og sosial samvera, áðrenn øll fara heim.

MC-Gudstænastan er almenn, so øll eru hjartaliga vælkomin.

Sosialurin
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo
Fyritaksstjóri Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marknaðardeild lysing@sosialurin.fo
Stovnaður: 1927
Prent: Prentmiðstøðin

Tórshavn Tórsgøta 1, 100 Tórshavn tel. 341800, post@sosialurin.fo
Suðuroy tel. 375364, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
Haldarar, *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*
Útgevari: Sp/f Sosialurin
Uppseting: Sosialurin
Avgreiðsla: mán - frí kl. 08.00 - 16.00